Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 63/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um rávøru og rávørugóðsku, settur landstýrismanninum í fiskivinnumálum Jacobi Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu góðskan er á fiski, sum kemur um føroyskan kaikant, samanborið við grannalond okkara t.d. Ísland?
2. Hvat heldur landsstýrismaðurin skal til fyri at betra um rávørugóðskuna?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta átøk í verk, sum eggja fiskiskipunum til at gera styttri túrar og soleiðis koma inn við feskari fiski?
4. Hvørjar avbjóðingar sær landsstýrismaðurin fyri sær í sambandi við, at føroysk skip í størri mun skifta siðbundnu línuskipini út við frystilínuskip?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at tryggja, at allur botnfiskurin verður atkomuligur hjá føroyskum ráfiskakeyparum?

Viðmerkingar:
Í Dimmalætting 28. februar staðfestir stjórin á Nevinum í Runavík, at vit í Føroyum eru á einum nógv lægri støði enn til dømis Ísland, tá tað kemur til góðsku á landaðum fiski. Hann vísir á, at í Íslandi hevur fleiri daga gamal fiskur einki virði, og at hetta hevur við sær, at bæði íslendsk og føroysk skip, sum landa í Íslandi, ikki koma inn við fiski, sum er eldri enn fimm dagar. Fiskurin, sum fer um føroyskan kaikant er ofta nógv eldri, tí at føroysku fiskiskipini gera longri túrar, tá teir landa í Føroyum. Umframt longu túrarnar vísir stjórin á Nevninum eisini á, at tað er stórur munur ímillum ymisku skipini/bátarnar alt eftir, um veiddi fiskurin er væl ella illa hagreiddur. Harafturat stúrir hann fyri, at føroyskir ráfiskakeyparar ikki fáa atgongd til ráfiskin. Í hesum sambandi vísir hann á, at tað støðugt verður torførari hjá óheftum virkjum, sum ikki eiga skip, at fáa hendur á rávøruni. Og hann ger somuleiðis vart við, at tað, at tað verður tosað um at lata upp fyri landingum uttanlands, er ein hóttan móti føroysku framleiðslufyritøkunum. Spyrjarin heldur, at tað er neyðugt at fáa hesi viðurskifti útgreinað nærri, og at fáa innlit í, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur hesum viðvíkjandi. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 5. mars 2020

Jóhannis Joensen